## Koyrdi ávirkaður

Ein maður bleiv tíðliga leygarmorgunin tikin fyri at koyra ávirkaður í Havn.

Tað var um sekstíðina leygarmorgunin, at løgreglan fekk boð um, at ein bilur hevði rent á eina av oyggjunum á ringvegnum í Havn.

Tað vísti seg, at bilførarin var ávirkaður, og hann varð tí tikin við á politistøðina, har blóðroynd varð tikin. Maðurin verður nú skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

**tn**

## Nakað av herverki

Løgreglan í Havn fekk eisini boð um, at herverk var gjørt móti einum bili í miðbýnum leygarnáttina, og sunnunáttina var herverk gjørt móti einum bili á Velbastaðvegnum.

Eisini var okkurt smávegis herverk gjørt í Tróndargøtu í miðbýnum í Havn sunnnunáttina.

**tn**

## Stjólu tveir gocarts og koyrdu fullir

Tveir 18 ára gamlir mans í Eysturoynni blivu sunnunáttina tiknir, eftir at teir høvdu stolið tveir gocarts og koyrdu fullir í teimum.

Teir báðir gocartarnir vóru tiknir í grótbrotinum á Lambareiði, men tá ið løgreglan fekk fatur á monnunum, koyrdu teir úti á Toftum.

Menninir royndu at koyra undan løgregluni, og síðani fóru teir at renna undan, men tað eydnaðist løgregluni at fanga báðar menninar, og blóðroynd varð tikin.

Teir verða nú ákærdir fyri bæði brúksstuldur og væntandi eisini rúsdrekkakoyring.

**tn**

## Óvanliga friðarligt í Havn leygarkvøldið

Sunnunáttin gjørdist óvanliga friðarlig hjá løgregluni í Havn. Vakthavandi á politistøðini sigur, at tað einasta, ið løgreglan fekk fráboðan um sunnunáttina, var okkurt smávegis herverk. Hann sigur, at tað vísir seg mangan, at tá ið tað er ringt veður, so halda fólk seg við hús, og so er væl friðarligari enn vanligt, sigur vakthavandi.

**tn**

## Skriviskeið fyri lesandi

Um tvær vikur fer MFS at skipa fyri einum skriviskeiði við høvuðsevninum argumentatión.

Tað er Dánjal Hoydal, stud. mag. í retorikki, sum skal standa fyri skriviskeiðnum.

Endamálið við skeiðnum er at menna skrivliga førleikan hjá luttakarunum. Arbeitt verður við m.a. at kenna aftur og greina sundur argumentatión, soleiðis at uppgávuskrivarin verður betur førur fyri at skipa argumentatiónina í eini skrivligari uppgávu.

Skeiðið verður hildið í Føroyahúsinum í Keypmannahavn leygardagin 22. oktober frá kl. 10 til 14. Tekning fer fram á mfs@mfs.fo

**tn**

HEYSTTILBOÐ

Frá mánadegnum 10. til leygardagin 15. oktober 2005

Mán 10. Clinique Øll foundation Neglalakk - 20%

Týs 11. Esteé Lauder Eygnaskuggar Private Spa Body Power - 20%

Mik 12. Origins Dag- og náttkrem & Fótserian - 20%

Hós 13. Allar parfumur ymisk undirklæðir - 20%

Frí 14. Allison & Naturtint hárliting - 20%

Ley 15. Allar gávudósur & Bourjois make-up - 20%

Sosialurin 341800

parfumarí Drós

Bøgøta 15 · Boks 24 · Tel. 314811 · Fax 314877

Ger vakurleika til veruleika



# Føroyskur dekk-kongur í Íslandi

**Tað er ikki bert Jákup á Dul Jacobsen, ið ger vart við seg sum føroyskan vinnulívsmann í Íslandi. Fríggjadagin lat havnarmaðurin Gunnar Justinussen nevnliga upp enn eitt dekkverkstað í Reykjavík, og talan er um tað níggjunda verkstaðið hjá Gunnari í Íslandi**

VINNULÍVSMAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Gunnar Justinussen greiðir frá í telefonini úr Reykjavík, at nýggja verkstaðið hjá honum er heilar 900 fermetrar til støddar, og sjey mans starvast á verkstaðnum.

### Nógv til kundan

Tað eru nú trý ár síðani, at Gunnar Justinussen lat upp fyrsta verkstaðið í grannalandinum fyri vestan. Fríggjadagin lat so, sum áðurnevnt, tað níggjunda upp, so ikki kann sigast annað, enn at tað hevur gingið við rúkandi ferð hjá havnarmanninum.

- Verkstaðið eitur "pit stop", og talan er um eitt heilt nýtt konsept hjá Michelin. Michelin í Evropa hevur gjørt alt við innrættan, arbeiðsbúnum og øðrum. Hetta er eitt ótrúliga flott verkstað við góðum umstøðum til kundarnar. Til dømis er internetkafé til kundarnar, og somuleiðis er møguleiki at keypa ymisk Michelinklæðir og annað, sigur Gunnar Justinussen.

Verkstaðið hjá Gunnari er í einum eldri bygningi, sum hann hevur fingið fatur á, og sum er gjørdur í stand til endamálið. Av teimum 900 fermetrunum, ið Gunnar hevur at ráða yvir á verkstaðnum, eru teir 150 burturav til kundan, sigur hann.

# Fíggjarlógin er tað reina bluff

**Formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana, heldur, at fíggjarlógaruppskotið hjá Bárði Nielsen, landsstýrismanni, er tað reina bluff**

FÍGGJARLÓGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Jenis av Rana vil verða við, at tað veruliga undirskotið á fíggjarlógini er um hálva milliard.

Hann vísir á, at tað eru fleiri útreiðslur, so sum barnavernd og apoteksverk, ið er koyrt út um fíggjarlógini saman við eitt nú Hovstunnilinum. Vóru hesar við á fíggjarlógini var hallið væl hægri, sigur Jenis av Rana.

### Skapa sær sjálvum trupulleikar

Formaður Miðflokksins dugir heldur ikki at skilja, at landsstýrið inntøkurføtur sølu av almennum ognum, hóast eingin vissa er um, at nakað verður selt í komandi ári.

Hetta ger, at Jenis av Rana kallar fíggjarlógaruppskotið fyri tað reina bluff, og hann dugir als ikki at síggja nakað til visión 2015 í uppskotinum, sigur hann.

Somuleiðis undrast Jens av Rana á, at játtanin til umsorganararbeiðið er skerd við 600.000 krónum.

- Tað var júst hetta øki, ið gav landsstýrismanninum nógv høvuðbrýggj fyrr í ár, tá ið tað frættist, at tænastan við matútbering til eldri fólk helt uppat, og at tilhaldini fóru at stongja. Tá var eitt øgiligt rok, men nú er játtanin aftur skerd, og so kunnu vit vænta, at tað verður sama rokið enn einaferð. Á henda hátt skapar landsstýrið sær sjálvum trupulleikar, heldur Jenis av Rana.